KARL HEINRICH ULRICH



# Manor

# Manor

Stuttsøga eftir Karl Heinrich Ulrichs.

Hanus Kamban týddi úr týskum.
Myndprýtt hevur Jón Sonni Jensen.
Fororð eftir Eiler Fagraklett.

*Henda útgávan er ognað minnið um slóðbrótarnar,*
*Róland Samuelsen og Rasmus Rasmussen.*

***Serlig tøkk til:***

Birgir Kruse, Wieland Speck,
Maritu Thomsen og Eiler Fagraklett

Útgevari: LGBT Føroyar, 2014
Prent: Føroyaprent
Umbróting: Dánjal Jacobsen

ISBN: 978-99918-3-415-3

# FORORÐ

**Ein sannur slóðbrótari**
Í juli 2014 eru 130 ár liðin síðan, týski rithøvundurin og rættvísistríðsmaðurin Karl Heinrich Ulrichs festi stuttsøguna *Manor* á blað.

Karl Heinrich Ulrichs var ikki sum aðrir samtíðarmenn. Hann var ein óvanliga djarvur, slóðbrótandi og framskyggin rithøvundur, løgfrøðingur, atgerðarfólk og LGBT stríðsmaður.

Karl Heinrich Ulrichs var fyrstur á mongum økjum.

Eitt nú kann nevnast, at:

- Karl er ofta mettur at vera fyrsti samkyndi persónurin, ið alment kunngjørdi sína kynsliga sannføring. Hann spretti longu í 1862. Áðrenn hetta var einans kynsliga sambandið millum tvey av sama kyni viðgjørt og ikki kynsliga sannføringin.
- Karl var fyrsti verulig stríðsmaðurin fyri løgfrøðiligum javnrættindum hja LGBTarum.
- Hann tók sítt stríð upp langt áðrenn heitið "samkyndur" ella "homoseksuellur" kom upp á tal. Hann valdi tí at kalla samkyndar menn fyri "urning".
- Hann skrivaði vampýrsøgur, áðrenn hesar gjørdust eitt vanligt og viðurkent rák innan vesturlendskan skaldskap.
- Karl skrivaði romantiskar og virðiligar stuttsøgur, ið viðgera samkyndleika langt áðrenn hetta var lógligt og góðtikið í vesturheiminum.
- Karl skrivaði um samkyndar føroyingar fyri heili 130 árum síðan.



# STUTT UM KARL HEINRICH ULRICHS

## Fyrsti samkyndi, ið alment spretti

Karl Heinrich Ulrichs var føddur 28. august 1825 í Aurich, sum er í útnyrðingspartinum av Týsklandi. Tá á døgum var Aurich býur í sjálvstøðuga kongaríkinum Hanover.

Karl Heinrich Ulrichs varð útbúgvin við lærda háskúlan í Göttingen í 1839. Hann las fyrst løgfrøði og gudfrøði. Síðan las hann víðari við fróðskaparsetrið í Berlin. Har var hann liðugur sum søgufrøðingur í 1848. Í 1849 byrjaði hann at arbeiða sum løgfrøðilgur ráðgevi hjá rættinum í Hildesheim. Har var hann verandi, til hann var uppsagdur í 1857, tá ið arbeiðsgevarin fekk frænir av hansara kynsligu sannføring.

Í 1862 tók Karl Heinrich Ulrichs eitt óvanligt og slóðbrótandi stig, hann fortaldi fyri familju, vinum og øllum heiminum, at hann var samkyndur. Ulrichs gjørdist sostatt fyrsti vesturlendski persónurin, ið alment spretti sum samkyndur.

Karl tók hetta stig, tá hann gav út eitt greinasavn, har hann hevði savnað sínar roynir og sína gransking innan evnið. Greinasavnið fekk heitið: *Forschungen über das Rätsel der mannmännlichen Liebe (Gransking í gátuni um kærleika millum menn).*

Karl Heinrich Ulrichs var ein sannur slóðbrótari, ein maður langt framman fyri sína samtíð. Hann var so langt frammanfyri, at einki orð enn var uppfunnið fyri hansara kynsligu sannføring, tá ið hann spretti í 1862.

Sjálvandi vóru longu fleiri orð fyri kynsligt samband millum tvey av sama kyni, tí hetta samband er eins gamalt og menniskjan. Men tað var ikki fyrr enn í 1869, at latínska orðið “homoseksuellur” varð smíða og fyrstu ferð brúkt alment av eysturríkska sálarfrøðinginum Karl-Maria Kertbeny. Orðið lýsir kynsligu sannføringina og ikki bara kynsligu gerðina, sum higartil var vanligt at viðgera og tosa um.

Í sínum fyrsta greinasavni hevur Karl tó uppfunnið egið heiti fyri samkyndar menn. Orð hansara er “urning”. Heitið tekur hann frá samkynda grikska filosoffinum Plato, sum í verkinum *Symposium* tosar um ymisk sløg av kærleika. Tvær ymsar kærleikaguðinnum, ið báðar eita Afrodita, umboða hesar kærleikar. Onnur er einans fødd av griska guðinum Uranus, meðan hin er dóttir guðarnar Zeus og Dione. Tí nýtir Ulrichs orðið “urning” um samkyndar menn, og heiti “dioning” um hinkyndir menn. Karl setur eisini seinni orð á samkyndar kvinnur, tvíkynd og tvørkynd.

Frágreiðingin hjá Ulrichs lýsir samkynd og samkyndleika sum natúrligan fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð. Hann roynir at byggja síni sjónarmið og sítt ástøði á lívfrøðina. Harafturat vísir hann á egnar lívsroyndir og royndir hjá øðrum samkyndum monnum, sum hann hevur havt samband við. Í sínum verkum eggjar Ulrichs øðrum samkyndum at gera eins og hann, at koma út og spretta.



Hesa tíðina vegleiðir og verjir Karl somuleiðis aðrar samkyndar menn løgfrøðiliga. Teir eru ákærdir fyri brot á §175, sum frá 1871 bannar samkyndleika kring alt Proysaland, ið legi Hannover undir seg í 1866.

Hetta bannið verður ikki tikið av aftur í Týsklandi fyrr enn í 1969. Líknandi lógir, ið gera samkyndleika millum menn til eitt álvarsamt lógarbrot, eru galdandi kring alt Evropa heilt til síðst í 20. øld. Tað var ikki vanligt at hava slíkar lógir fyri samkyndar kvinnur.

Karl Heinrich Ulrichs kom sjálvur í kløtur við lógarvaldið, tó ikki vegna ólóglig kynsligt sambond ella brot á §175, men vegna hansara orðaval og ritverk. Sum frá leið vóru flestu verk hansara bannað í gamla Proysalandi.

## Fyrsti LGBT stríðmaðurin

29. august 1867 skrivaði Karl Heinrich Ulrichs aftur søgu. Hesa ferð steig hann fram fyri stóra fjøld av týskum løgfrøðingum í München, har teir árliga hittust at fundast um løgfrøðilig áhugamál. Karl helt eina søguliga røðu um at veita javnrættindi til samkynd, at verja hesi rættindi, og at enda bað hann týsku løgfrøðingarnar stuðla eini lógarbroyting, soleiðis at samkyndleiki ikki longur skuldi vera eitt lógarbrot.

Hetta var fyrstu ferð í søguni, at nakar veruliga vísti á tørvin hjá samkynda minnilutabólkinum at fáa somu rættindi, sum hinkyndi meirilutin vanliga tekur fyri givið.

Stuðul fekk hann tó ikki frá starvsfeløgunum. Karl varð háðaður og róptur niður av pallinum.

Karl Heinrich Ulrichs gavst tó ikki so. Hann helt fram at berjast fyri rættindum hjá samkyndum og ferðaðist nógv kring alt Týskland. Í 1879 flutti hann tó til Italia, har hann endaligt búsetti seg í lítla býnum L’Aquila og andaðasti hin 14. juli í 1895. Karl Heinrich Ulrichs er jarðaður í italska bynum.

Seint í lívi sínum skrivaði Ulrichs soleiðis um sínar lívsroyndir: “Til mín doyggjandi dag fari eg at minnast aftur á við stoltleika, at eg megnaði at finna dirvið at standa andlit til andlits við bardagan mótvegis ódjórinum, sum í allar ævir hevur sprænt eitur í meg og menn við somu náttúru sum eg. Nógvir menn hava kent seg noyddar at taka egið lív, tí øll teirra lívsgleði varð giftað. Eg eri avgjørt stoltur av, at eg fann dirvið at taka tað fyrsta harða slagið av almennari vanvirðing”.

## Framskygdur rithøvundur

Ulrichs var ein sera virkin rithøvundur. Eftir seg, hevur hann latið ein hóp av bæði yrkisbókmentum og fagurbókmentum. Yrkingar, stuttsøgur, essays, skaldsøgur og tíðindagreinar í hópatali.

Eitt av hesum verkum er stuttsøgan, *Manor*. Talan er um ein av fýra ymiskum stuttsøgum, sum vóru samlaðar í savninum *Matrosengeschichten (Sjómannasøgur)* og útgivnar í Týsklandi í 1885.

Stuttsøgurnar í savninum eita *Sulitelma*, *Atlantis*, *Manor* og *Der Mönch von Sumbö* og tær fara fram í Noreg, Skotlandi og Føroyum. Flestu stuttsøgurnar í savninum hava eitthvørt við samkyndar menn at gera, og kanska serliga *Manor*.

Karl Heinrich Ulrichs hevur upplýst, at *Manor* var skrivað í tíðarskeiðinum 22. til 30. juli í 1884, meðan hann búði í útlegd í Italia.

Við aldrinum gjørdist rithøvundurin upptikin av romantiska rákinum innan týskar bókmentir, eins og hann gjørdist serstakliga hugtikin av Norðurlondum og Norrønu gudalæruni. Hetta sæst væl aftur í *Manor*.

Eingin veit við vissu at siga, men flestu serfrøðingar eru á einum máli um, at Karl Heinrich Ulrichs ongantíð sjálvur var í Føroyum ella í hinum Norðurlendsku londunum, ið so ofta vera nevnd og viðgjørd í hansara seinna skaldskapi.



Hinvegin er væl hugsandi, at hann hevur roynt sum frægast at lisið landakortini av Føroyum og Norðuratlanshavinum, ið vóru til taks í hansara samtíð. Hetta síggja vit aftur í landafrøðiligu lýsingunum av Føroyum. Eitt nú vil hann vera við, at 35 oyggjar eru í Føroyum, og at til ber at svimja dagliga í "flógvu aldunum" í Vestmannasundi.

Um hann sjálvur hevði vitjað á klettunum, so hevði hann skjótt lært rætta talið av oyggjum, og at tað er alt annað enn lætt at svimja tvørtur um Vestmannasund við sera sterkum streymi og køldum sjógvi.

Kim Simonsen hevur granskað nógv í føroyskum samleika, og hvussu hesin samleiki verður sæddur í okkara egnu eygum og við útlendskum eygum. Hann vísir á, at í 19. øld gjørdist ímyndin av norðurøkinum og tí eisini Føroyum munandi meira veruleikafjarð enn áður. "Fólk sunnnfyri fóru at tilbiðja norðurlendsku gudalæruna og fornsøgurnar, og kvæðahejtur sum Sjúrður og sjálvt Sigmundur og Tróndur gjørdust hvørmansogn í Evropa" sigur Kim Simonsen. Hann leggur afturat: "Ferðandi í Føroyum í 19. øld fagnaðu føroyingum sum ósek og rein fólk, ið livdu eitt autentiskt lív í samljóði við náttúruna." (*Atlantic Review*, vári 2014).

Hetta síggja vit aftur í *Manor*, har allar tilvísingar til eitt nútíðar kristið samfelag eru mest sum skúgvaðar til viks fyri eina gandakenda náttúruperlu, har gamlar konur duga gand, og vampýrar eru so at siga vanligir bygdagestir.

"Mong staðarnøvn minna um tíðina, tá ið ongar kirkjur vóru í Føroyum, og tann gamla trúgvin ikki enn var burturtrokað, eitt nú Tórshavn á Streymoynni, sum eitur eftir Tóri, torunnar gudi" skrivar Karl í *Manor*.

Søgur og sagnir um vampýrar eru elligamlar og finnast í flestum mentanum. Søgurnar, sum vit kenna í dag, koma tó serliga úr Eysturevropa. Í 1819 skrivaði John Polidori skaldsøguna *The Vampyre*. Hansara lýsing av vampýrum fekk stóra ávirkan á, hvussu fólk í 19. øld ímyndaðu og hugsaðu um vampýrar. Henda lýsing hevur uttan iva eisini ávirkað hugaheim Ulrichs.



Men tað er ikki fyrr enn Bram Stoker útgav skaldsøguna *Dracula* í 1897, at hugmyndin um vampýrar, sum vit kenna hana í dag, veruliga varð skapt og kjølfest í okkara vesturlendska mentunararvi og gjørdist ein vanligur partur av vesturlendskum skaldskapi.

Á henda hátt er Karl Heinrich Ulrichs enn eina ferð framman fyri sína samtíð, tá hann gevur sína vampýrsøgu út heili átta ár áðrenn Bram Stoker.

## Í hansara djørvu fótafetum

Hóast samtíðin royndi at banna og teppa hansara slóðbrótandi arbeiði fyri javnrættindum hjá samkyndum, eins og hansara homoerotiska skaldskap, so køvdi hon han ikki




Í dag hevur Karl Heinrich Ulrichs fingið fast pláss í altjóða søgubókunum, og gøtur í München, Bremen og Hannover eru uppkallaðar eftir djarva stríðsmanninum, ið gekk á odda og slóðaði fyri tí arbeiði, sum eitt nú LGBT Føroyar virkar fyri í dagsins Føroyum.

Akkurát 130 ár eftir, at hann einsamallur sat í lítlari italienskari bygd og droymdi seg burtur til Føroyar og skrivaði um ungar samkyndar menn og teirra lív á hesum fjarskotnu og vøkru oyggjum, fáa føroyingar endiliga høvi at lesa hansara stuttsøgu á føroyskum.

Vónandi eygleiður hesin megnar maður nú sítt lívsverk úr einum betri staði og gleðist um, hvussu langt hansara LGBT systrar og brøður eru komin í javnrættisstríðnum, sum hann var við at byrja fyri næstan 150 ár síðan. Vit, sum í dag enn stríðast fyri javnrættindum fyri samkynd, tvíkynd og tvørkynd í Týsklandi, í Føroyum og kring allan heimin annars, ganga í hansara djørvu fótafetum.

Friður verið við minninum um Karl Heinrich Ulrichs.

Vegna LGBT Føroyar
*Eiler Fagraklett*





# 1

Mitt í Norðurhøvum liggja 35 oyggjar, einsamallar og burturgloymdar, líka langt frá Skotlandi, Íslandi og Norra. Føroyar eita tær. Har er oyðið, har eru sker og drangar, og skýslør sveipa seg um tindarnar. Har hoyrist syrgið gól frá flagsandi likkum og másum, aldurnar skola, og brimið brýtur. Næstan altíð eru oyggjarnar huldar í mjørka. Á sumri síggjast tindarnir, 1800 og 2000 føtur yvir havinum. Har dagar veðurbart berg, har eru trølsligar gjáir, har er frumskógur við granntrøum. Úr keldum í túsundatali fossar vatnið úr ørandi hæddum, klett av kletti, skúmandi og brúsandi omaneftir. Fram við strendurnar síggjast djúpar víkir og langir firðir skera seg inneftir. At kalla allastaðni reisir seg ógongt berg. Rundanum skolar havið við skerum og flúrum, við íðum og hørðum meldurstreymum, so at mangastaðni slepst ikki at landi við báti. Bara á 17 oyggjum býr fólk. Millum Streymoy og Vágar er bara eitt smalt sund. Tað ber til at svimja yvirum, men so skal svimjarin vera djarvur. Mong staðanøvn minna um tíðina, tá ið ongar kirkjur vóru í Føroyum og tann gamla trúgvin ikki enn var burturtrokað, eitt nú Tórshavn á Streymoynni, sum eitur eftir Tóri, torunnar gudi.

Í teirri tíðini róði ein útróðrarmaður úr Streymoy út á tað opna havið við sínum 15 ára gamla soni. Ódn kom á teir, báturin sakk, og sonurin varð tveittur upp á eina fles undir Vágoynni. Hetta sá ein ungur sjómaður úr Vágum. Hann leyp út í aldurnar, svam millum sker og riv, fekk fatur á drongin, sum nú rak í sjónum, og bar hann upp á land. Hann setti seg við honum á ein stein. Drongurin var næstan stirðnaður av kulda, men sjómaðurin legði hann á knøini, tók um hann og fekk lív í hann. Tá læt drongurin eyguni upp.

"Hvussu eitur tú?" segði sjómaðurin.

"Hárður. Eg eri úr Streymoy", segði drongurin.

Sjómaðurin róði hann yvir um sundið aftur til Streymoyar og fór við honum til Laru, móður hansara. Tá ið sjómaðurin fór avstað, hálsfevndi drongurin takksamur sín bjargara. Seinni rak pápin upp á land sum lík. Sjómaðurin æt Manor. Hann var foreldraloysingur og fýra ár eldri enn Hárður. Hann var blivin góður við drongin og longdist eftir at síggja hann aftur. Av og á róði hann nú yvirum til Streymoyar, og tá ið summarið kom, og dagsins verk var gjørt, svam hann yvirum gjøgnum tær flógvu aldurnar. Hárður fór oman til strandar, kleiv upp á ein hamarsklett og veittraði við sínum turriklæði, tá ið hann langt burturi sá bátin hjá Manor nærkast. Teir vóru nú saman ein tíma ella tveir. Í logn róðu teir út á hav og sungu sjómansvísur. Ella teir lótu seg úr, kavaðu og svumu yvir á sandstrondina yvirav, so kóparnir, sum sólaðu sær á sandinum har, tóku til rýmingar. Ella teir gingu inn í tann dimmgrøna skógin, har høg granntrø við sínum brúsandi krúnum boðaðu taluna hjá gudinum Tóri. Ella teir settu seg á ein stein undir greinini á eini gamlari bók, prátaðu um leyst og fast og løgdu ætlanir. Um einaferð eitt skip skuldi komið, sum fór á stórhvalaveiðu, so ætlaðu báðir sær við. Og sum teir sótu har á klettinum, legði Manor armin um akslarnar á Hárði og segði "Mín drongur". Og hetta, at Manor soleiðis fevndi seg, var tað besta drongurin visti. Var tað seint, tá ið hann kom, fór hann spakuliga yvir til sýrenrunnin, sum skuggaði fyri vindeyganum hjá Hárði, og pikkaði á rútin. Hárður vaknaði og sníkti seg út til hansara. Og hann føldi seg so lukkuligan, bara hann slapp at vera saman við Manor.

## II

Tá kom ein donsk trímastrað skonnart og kastaði akker í tí tryggu víkini í Vágum. Teir skuldu fara á hvalaveiðu í tveir mánar og søktu eftir matrósum. Manor fór um borð. Skiparin gav alt fyri eitt tí mjávaksna, raska, unga dronginum hýru. Hárður vildi fara við sum kahútsdrongur. Men Lara gramdi seg og helt fyri: “Tú ert mín onkarsonur. Pápi tín gekk burtur á havinum. Ætlar tú at rýma frá mær?” Hárður fór ongan veg. Manor fór avstað. Teir drógu akkerið upp, og skipið sigldi.

Tveir mánar vóru gingnir. Tað leið longu móti vetri. Hárður fór upp á hamaran, skimaðist víða, sá ein morgun skipið nærkast og veittraði glaður við turriklæðnum. Stormur var og brimið breyt í bakkan. Skipið stevndi móti víkini í Vágum. Men tað eydnaðist ikki at koma at landi, skipið rak av kós, varð slongt inn ímillum Streymoyar vandamiklu riv og fór á land beint fyri eygunum á Hárði. Hann sá, hvussu teir skipbrotnu bardust við aldurnar. Millum teirra sá hann ein, sum við sínum sterku ørmum tók um ein planka, men í næstu løtu, sá hann, vórðu maður og planki slúktir av briminum og hvurvu niður í meldurstreymin. Hárður kendi mannin. Tað var Manor.

Mong lík róku á land. Tey breiddu hálm á strondina og løgdu teir deyðu har lið um lið. Hárður hjálpti til og hugdi gjølla at teimum, sum lógu har. Tá komu teir eisini við líkinum av Manor og løgdu tað á hálmbreiðsluna. Har lá hann nú fyri honum við vátum hári, sjógvur dryppaði úr tí, eyguni vóru afturlatin, varrarnar litleysar, kjálkarnir bleikir og blóðleysir, mjáur á vøkstri, men – í deyðanum – sum hann var vakur! “Soleiðis, Manor, skuldi eg síggja teg aftur!” rópti Hárður, tveitti seg stórgrátandi yvir tað elskaða likamið og leskaði eina seinastu løtu frøina í einum favntaki.

Líkini vórðu førd yvir um sundið. Sama dag vórðu tey grivin í sandheyggjunum í Vágum.

## III

Um kvøldið sat Hárður í smáttuni dapur og tigandi. Lara vildi ugga hann. Men hann vildi ikki uggast. Hann bað ilt yvir gudarnar. Hann fór í song, men fekk ikki sovið. Móti midnátt lá hann millum svøvn og vøku.

Tá vaknaði hann av einum ljóði. Hann fór at hyggja. Tað var uttanfyri við vindeygað. Greinarnar í sýrenrunninum brakaðu, og tað skróvaði í turrum bløðum. Vindeygað varð latið upp. Onkur kom inn. Hey! Hann kendi hesa skepnuna! Hóast myrkrið hevði hann straks kent hana! Hon nærkaðist við seinum fótafetum. Hon legði seg í songina hjá honum. Hann









skalv, men gjørdi onga mótstøðu. Hon streyk honum eftir kjálkunum, men sum hondin var køld, á, so køld, so køld! Hann nøtraði av fepurkulda. Hon kysti tann heita, túsnandi dreingjamunnin við ísakøldum vørrum. Hann føldi tey vátu klæðini hjá honum, ið kysti. Tað váta hárið hekk niður í pannuna á honum. Tað fór honum kalt niður eftir bakinum. Men ræðslan var blandað við sælu. Skepnan suffaði. Tað ljóðaði, sum vildi hon siga:

"Mær longdist so illa eftir tær! Eg fái ikki frið í míni grøv!"

Hann tordi onki at siga. Hann tordi nóg illa at anda. Og brátt fór skepnan á føtur. Hon suffaði, sum vildi hon siga:

"Nú má eg fara heim aftur!" Hon steig upp á stólin við vindeygað og fór avstað sum hon var komin.

"Hatta var Manor," teskaði Hárður fyri seg sjálvan.

Hesa somu náttina var ein útróðrarmaður úr Streymoynni úti á sundinum við sínum báti. Havið glógvaði. Neistar skygdu úr árini. Brádliga, stutt fyri midnátt, hoyrdi hann eitt merkiligt skvatl. Hann sá, hvussu okkurt smeyg gjøgnum tær lýsandi aldurnar, okkurt, hann ikki hómaði skapið á, kvikt sum ein stórur fiskur, við kós móti Streymoynni. Fiskur var tað ikki, so frægt dugdi hann á at skyna í myrkrinum.

Ta næstu náttina kom Manor aftur, ísakaldur sum náttina fyri, men grammari. Hann fevndi drongin við køldum ørmum. Hann mussaði hann á kjálkan og munnin og legði høvdið móti hansara mjúku bringu. Hárður skalv. Hjartað fór at banka av tí inniliga favntakinum. Og nettupp har, at tí bankandi hjartanum, legði Manor høvdið. Varrarnar nærkaðust einum stað oman fyri hjartað, bunguni har, sum bólgnaði mjúkan og sum hjartaslátturin fekk at skelva. Har fór hann at súgva, grammur og tystur, sum ein nýføðingur úr boppuni á mammu síni. Men eina løtu seinni gavst hann, reisti seg upp og fór. Hárður kendi tað, sum hevði eitt djór sogið seg ótyst úr honum.

Eisini hesa náttina var sami útróðrarmaður úti á sundinum. Og um júst somu tíð sum náttina fyri hoyrdi hann aftur skvatlið. Onkur kom framvið, men nærri hesa ferð. Í tí bleika mánalýsinum sá hann tað: tað var ein maður ið svam. Hann svam liggjandi á høgru lið, sum sjómenn stundum svimja, men í líkverju. Svimjarin tóktist ikki varnast fiskimannin, hóast hann vendi andlitinum ímóti honum.

Hann svam við afturlatnum eygum. Henda sjónin var so undarlig, at útróðrarmaðurin dró gørnini inn og róði avstað.

Tær komandi næturnar kom Manor aftur. Stundum fevndi hann drongin, meðan hann svav. Tí viðhvørt fall drongurin í tyngd, til Manor kom. So vaknaði hann við, at Manor lá og helt um hann. Hvørja ferð leitaðu varrarnar eftir tí mjúku bunguni yvir hjartanum. Í dagslýsi sá Hárður av og á, hvussu ein evarska lítil blóðdropi perlaði úr tí vinstru bróstvørtuni. Hann turkaði hann burtur við skjúrtuni. Stundum sást, at ein lítil dropi longu var dryppaður á skjúrtuna. Bara tá ið fullmáni var, kom Manor ikki.

Ofta verður tann deyði yvirtikin av brennandi longsli eftir onkrum av sínum kæru, sum eftir liva. So sterk er henda trá, at hann fer upp úr síni grøv og leitar tann elskaða upp. Tí gomul trúgv er, at gudinnan Urð um miðju nátt gevur mongum eitt stokkut hálvalív aftur, veitir teimum eina sjáldsama megi hinumegin gravarinnar gátt. Hetta hendir serstakliga ung fólk, sum tann beiski deyðin tók burtur mitt í ungdómsins blóma. Tann, sum gongur í hamferð, trongir tá illa til blóð og varma. Tá mungar hann eftir frískum blóði frá teimum livandi, og tráar, sum ein elskandi, eftir at verða fevndur. Men hann loypir eisini sterkan longsul á onnur og veitir teimum svára kvøl.

Soleiðis var eisini í hesum føri. Hárður píndist og gramdi seg tann líðilanga dag. Men ótolin bíðaði hann eftir, at náttin kom. Við bivandi hjarta brellaðist hann eftir midnáttar fevnandi ørmum og sælu nøtran.

# IV

Nú mundu tólv dagar vera gingnir.

"Sum tú ert bleikur og følin," segði Lara. "Hvat feilar tær, Hárður?"

"Onki, mamma," segði hann.

Hann suffaði. - - -

Í tí uttasta húsinum í bygdini búði ein vís kona, sum dugdi meir enn at mata seg. Til hennara fór tann stúrandi mamman. Tann vísa konan risti rúnir við sínum kelvi.

"Tey deyðu ganga aftur," segði tann vísa konan.

"Tey deyðu?" segði Lara.

"Ja, um náttina. Og onkur fer at doyggja, um hesar hamferðir ikki verða steðgaðar, áðrenn ov seint er."

Lara fór heim, illa við.

"Er tað satt, Hárður," segði hon, "at tey deyðu heimsøkja teg?"

Hann hugdi niður. "Manor hevur verið her," segði hann spakuliga og fall grátandi at hennara bringu.

"So verið gudarnir tær náðigir!" segði hon.

"Gudarnir?" segði Hárður, "eg meini tað! Hvat nytta gudarnir mær? Tá ið hann krøkti seg í plankan, neyðar maður, tá kundu teir verið mær náðigir, um teir vildu. Men teir vístu onga miskunn og látu hann søkka. Sum eg var góður við hann!" - -

Nú varnaðist hon eisini blóðið á skjúrtuni. Tá fór hon til teir elstu í bygdini. Teir róðu yvir um sundið til Vágar við soninum og mammuni, og ta vísu konuna tóku teir við. Við vágamenn søgdu teir:

"Tykkara gravir eru ótættar. Ein maður fer úr síni grøv hvørja nátt og kemur higar til okkara. Hann sýgur seg ótystan av blóðinum hjá hesum dronginum."

"So mugu vit festa hann," søgdu vágamenn.

Teir tóku nú ein grannsteyra, sum var manshædd høgur og tjykkri enn ein armur. Teir høgdu hann fýrkantaðan og høgdu fótlangan spíss í neðra. So fóru teir oman á sandin. Ein bar steyran, ein annar hevði stóra øks í hondini. Teir opnaðu grøvina hjá Manor. Har lá hann kvirrur fyri teimum í síni líkverju.

Annar vágamaðurin segði: "Hygg! Hann liggur enn, soleiðis sum vit løgdu hann."

"Tað er tí hann leggur seg hvørja ferð, sum hann varð lagdur," svaraði tann vísa konan.

"Har er meira lív í andlitinum enn fyrr," segði hin vágamaðurin.

"Ei undur í," svaraði tann vísa konan. "Hvaðna bleikari er Hárður í andliti."

Hárður steig niður í grøvina og blakaði seg aftur yvir tað elskaða líkið.

"Manor! Manor!" rópti hann við angist í røddini. "Teir ætla at stinga ein steyra ígjøgnum teg. Manor, vakna! Lat eyguni upp. Tín Hárður rópar á teg!"

Men Manor læt ikki eyguni upp. Meðan Hárður fevndi hann, lá hann uttan at røra seg, líkasum tólv dagar frammanundan á hálmbreiðsluni á strondini.

Hárður vildi ikki sleppa honum. Teir skræddu hann leysan. Teir settu tann spíska steyraendan á bringuna á Manor. Hárður suffaði og vendi sær burtur. Hann fall um hálsin á mammu síni og krógvaði andlitið við hennara øksl.

"Mamma," rópti hann, "hví hevur tú gjørt hetta ímóti mær!"









Hann hoyrdi tann flata øksarhamaran klamsa niður á steyran og steyran braka. Eitt tungt slag. Eitt slag aftrat og aftur eini seks sløg.

“Nú er hann festur!” segði tann fyrri vágamaðurin.

“Aftur kemur hann ikki,” segði hin.

Hárð, sum næstan var fallin í óvit, máttu teir bera burtur. “Nú fært tú frið fyri honum, elskaða barn!” segði Lara, tá ið tey aftur vóru í smáttuni.

Hárður fór at leggja seg tungur í huga. “Nú kemur hann ikki aftur!” segði hann sorgarbundin fyri seg sjálvan. Hann var móður og máttleysur. Hann hevði hvørki frið ella ró á sær og lá og brestist á síni legu. Minuttirnir listaðu avstað. Tímarnir førkaðu seg trekliga. Midnáttin kom, og enn hevði ongin svøvnur lagt seg á hansara eygnalok.

Hoyr! Hvat var hatta? Í sýrenrunninum ... – Men nei, tað var ómøguligt. Og tó! Aftur hoyrdist skróv í greinunum, sum fyrr. Vindeygað fór upp. Manor var aftur har. Hann suffaði tungliga. Hann hevði eitt stórt sár í bringuni, tað var fýrkantað og gekk tvørtur ígjøgnum ryggin. Hann legði seg aftur hjá Hárði, fevndi hann og fór at súgva. Hann seyg, grammari og tystari enn fyrr.

Men hesa náttina lá Lara vakin hinumegin. Hon lurtaði og skalv. Tíðliga morgunin eftir kom hon inn og fór yvir til songina.

“Neyðar barn!” segði hon, “so hevur hann verið her.”

“Ja, mamma,” segði hann, “hann hevur aftur verið her hjá mær.”

Men songin var dálkað av blóði frá líkinum. Tað var seyrað úr tí stóra sárinum.

Nakrar tímar seinni róði ein bátur yvir aftur um sundið. Men Hárður var ikki við. Teir fóru aftur til sandheyggin og opnaðu aftur grøvina. Tann fýrkantaði steyrin stóð enn í grøvini, men ikki longur í bringuni á Manor. Sjálvur lá hann samankropin við síðuna av steyranum. Tí steyrin gjørdi, at hann fekk ikki ligið útrættur.

“Hann hevur kunnað gjørt seg leysan,” segði tann vísa konan. “Steyrin er jú javntjúkkur í neðra og í erva.”

“Hann hevur tikið seg úr neðra upp eftir steyranum,” segði annar vágamaðurin.

“Men tað má hava kravt ómenniskjansliga styrki,” svaraði hin.

Eftir ráðum frá tí vísu konuni høgdu teir henda dagin ein sterkari steyra. Teir høgdu hann dupult so tjúkkan í erva sum í neðra, so hann líktist einum stórum trænagla við høvdi. Teir tóku tann gamla steyran burtur og rendu henda gjøgnum Manor.

“So! Nú er hann soymdur fastur,” segði øksamaðurin, tá ið hann hevði givið steyranum síðsta slagið á høvdið.

“Lat hann nú vríggja og vriða seg,” helt ein annar vágamaður fyri, “nú vríggjar hann seg ikki leysan.”

Lara fór heim aftur til Hárð og fortaldi, hvat ið hent var. "Nú er søgan úti," segði hann við seg sjálvan, tá hann fór at leggja seg. Hann lá klárvakin. Midnáttin kom. Men alt var kvirt. Onki skróv hoyrdist uttanfyri við vindeygað, í greinunum á sýrenrunninum. Tann ungi útróðrarmaðurin hevði frið. Ongin svam longur við afturlatnum eygum yvir um sundið og loypti ræðslu á hann.

Lara segði: "Nú hevur tú frið fyri honum. Hann hevur plágað teg so illa."

"Á, mamma, mamma!" svaraði hann, "hann hevur ikki plágað meg!"

Hárður gramdi seg, heilt fyri ongum av longsli. "Mamma!" segði hann, "nú er úti við mær." Hann svann burtur. Hann orkaði ikki úr songini.

"Tú ert so móður og veikur, mín elskaði sonur!" segði mamman.

"Hann dregur meg niður til sín," svaraði hann.

Ein morgunin sat hon við songarstokkin hjá honum. Hann var ikki vaknaður. Ein máni var gingin, síðan skipið fór á land. Tað var enn tíðliga. Hon græt. Tá læt hann eyguni upp.

"Mamma," segði hann málveikur, "eg fari at doyggja."

"Nei, nei, barn mítt!" svaraði hon. "Tú mást ikki doyggja so ungur."

"Jú, jú. Hann hevur aftur verið og vitjað. Vit hava prátað saman. Vit sótu á steininum undir tí gomlu bókini í skóginum sum tá. Hann hálsfevndi meg aftur og kallaði meg "sín drong". Í nátt kemur hann aftur eftir mær. Tað hevur hann lovað mær. Eg kann ikki liva uttan hann."

Hon bukkaði seg yvir hann, og tárini runnu so stríð niður á songina. "Mítt neyðar barn!" segði hon og legði hondina á pannuna á honum.

Tá ið nátt var, tendraði hon eina lampu og vakti hjá honum við songina. Hann lá stillur. Hann svav ikki. Hann lá tigandi og hugdi fram fyri seg.

"Mamma!" segði hann.

"Hvat vilt tú, elskaða barn?"

"Leggið meg í grøvina hjá honum. Góða, kunnu tit ikki? Og takið handa ræðuliga steyran úr bringuni á honum!"

Tað lovaði hon, og sum tekin rætti hon honum hondina og kysti hann.

"Á, nakað søtt má tað vera at liggja hjá honum í grøvini!" segði hann.

Tá kom midnáttin. Við eitt stóð ein ljómi av dýrd um hansara andlit. Hann lyfti høvdið eitt sindur, sum lurtaði hann. Við glógvandi eygum hugdi hann móti vindeyganum og greinunum í sýrenrunninum.

"Hygg mamma, har kemur hann!" - -

Tað vóru hansara síðstu orð. Tá sloknaðu eyguni.

Hann fall niður á aftur koddan og gav upp andan.

Og teir gjørdu sum hann bað.





“Til mín doyggjandi dag fari eg at minnast aftur á við stoltleika, at eg megnaði at finna dirvið at standa andlit til andlits við bardagan mótvegis ódjórinum, sum í allar ævir hevur sprænt eitur í meg og menn við somu náttúru sum eg. Nógvir menn hava kent seg noyddar at taka egið lív, tí øll teirra lívsgleði varð giftað. Eg eri avgjørt stoltur av, at eg fann dirvið at taka tað fyrsta harða slagið av almennari vanvirðing”.

*Karl Heinrich Ulrich*

LGBT
FØROYAR

ISBN 978-99918-3-415-3
9 789991 834153